# Mjølnir hóttir nú av álvara TB




*Dysturin millum Fleyr og ÍF hevur fingið nógva umrøðu, men sunnudagin varð hann so endiliga spældur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Oddaliðið TB spældi ikki hetta vikuskiftið, og tað gjørdi Mjølnir sær dælt av við at vinna tveir dystir og koma upp á sama stigatal sum TB-kvinnurnar. Alt bendir nú á, at innanhýsis dystirnir millum hesi bæði liðini nú verða avgerandi fyri hvar føroyameistaraheitið endar**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Eftir at landskappingin hevur verið í jólafrí varð lagt aftur til brots hetta vikuskiftið, og tað var ikki við mýkindum. Heili sjey dystir vórðu leiktir leygardagin og sunnudagin, og fýra av teimum vóru í kvinnudeildini. Upprunaliga vóru bara tríggir á skránni, men nýggi dysturin í grundspælinum millum Fleyr og ÍF kom so afturat. Hann vann ÍF 3-2, men tað var serliga Mjølnir, sum fekk nógv burturúr hesum vikuskiftinum.

## Tveir dagar - fýra stig

Leygardagin høvdu mjølnirkvinnurnar vitjan av ÍF, og tær gjørdu skjótt av við liðið úr Fuglafirði. Serliga í øðrum setti var munurin stórur, og sum heild var heimaliðið sjáldan undir nøkrum varandi trýsti.

Dagin eftir fór Mjølnir so vestur í Vágarnar at møta Drátti. Dráttur hevði eisini spælt leygardagin og vunnið 3-0 móti Fleyr, so bæði liðini vóru við gott mót við dystarbyrjan. Tað skuldi tó vísa seg, at mjølnirkvinnurnar vóru eitt vet ov sterkar fyri tær hjá Drátti. Í fyrsta setti var ikki so stórur munur á liðunum, men Mjølnir vann 25-21. Tær vunnu eisini næsta settið, hesaferð so trygt sum 25-15, og nú bleiv brekkan ógvuliga tung at ganga hjá drátturkvinnunum. Tær fingu tó svarað aftur í triðja setti, sum tær vunnu 25-21, samstundis sum Mjølnir valdi at skifta leikarar út. Men í fjórða setti var alt aftur við tað gamla, og Mjølnir vann 25-19. Við sigrinum kom Mjølnir upp á sama stigatal sum TB, sum ikki spældi hetta vikuskiftið. TB-kvinnurnar hava leikt ein dyst færri og hava eisini nógv betri settmun, men eins og í fjør er tað nú lagt upp til ein sera spennandi endaspurt í bestu kvinnudeildini. Í fjør var Dráttur annar parturin í oddastríðnum og endaðu við at vinna tað, men við ósigrinum leygardagin eru teir endaliga settar til viks í hesum oddastríðnum, sum nú bara stendur millum TB og Mjølnir. Bæði á Tvøroyri og í Klaksvík munnu tey so smátt vera farin at ásanna, at tað verður í innanhýsis dystunum millum hesi bæði liðini, at kappingin um føroyameistaraheitið verður avgjørd. Tann 27. januar skal Mjølnir til Suðuroyar, og í næstsíðsta umfarinum 2. mars skal TB so til Klaksvíkar. Inn ímillum teir báðar dystirnar skulu liðini so eisini fáa eina steypafinalu av vegnum...




*Dráttur vann tryggan sigur á Fleyr í Havn, men tað verða helst ikki tær, sum í ár koma at avgera FM-stríðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



## Grundspælið loksins liðugt

Annars bleiv grundspælið í meistaradeildini hjá kvinnum eitt sindur drúgvari enn ætlað. Dysturin millum Fleyr og ÍF hevur fingið nógva umrøðu, men sunnudagin varð hann so endiliga spældur. Upprunaliga dystin vann ÍF 3-1, men tað úrslitið fekk einki gildi. Nú dysturin varð spældur umaftur sunnudagin, vann ÍF aftur, hesaferð 3-2, og tað er fyrsti landskappingarsigur hjá ÍF síðani 28. oktober! Í dag ljóðar tað rættiliga óhugsandi, men tá vann ÍF altso 3-2 móti Mjølni í Klaksvík. Síðani tá hevði eysturoyarliðið spælt seks dystir og tapt teir allar (her rokna vit ikki fyrra dystin móti Fleyr við). Men tann keðiliga gongdin varð altso steðgað í Gundadalshøllini sunnudagin.

ÍF vann tvey tey fyrstu settini rættiliga trygt 25-17 og 25-13, men so vann Fleyr tvey tey næstu 25-23. Í síðsta settinum var krútið uppi hjá havnarliðnum, og við Helen á Lakjuni á odda vann ÍF hetta síðsta setti so mikið sum 15-3.

Við hesum úrslitinum, sum gevur ÍF eitt stig afturat, kom liðið úr Fuglafirði upp á sama stigatal sum Fleyr, men settmunurin hjá ÍF er væl betri enn tann hjá Fleyr.

### Úrslitini um vikuskiftið

Fleyr-Dráttur 0-3 (20-25, 24-26, 16-25)
Mjølnir-ÍF 3-0 (25-16, 25-8, 25-18)
Dráttur-Mjølnir 1-3 (21-25, 15-25, 25-21, 19-25)

### Seinasti dysturin úr Grundspælinum

Fleyr-ÍF 2-3 (17-25, 13-25, 25-23, 25-23, 3-15)





*Serstakliga Mjølnir fekk nógv burtur úr vikuskiftinum. Leygardagin vunnu tær tryggan sigur á ÍF, og sunnudagin vitjaðu tær so á Giljanesi, har tað somuleiðis spurdust tvey stig burturúr*
*Myndir: SjH & Edvard Joensen*

STARVSFÓLK
til skipsdeildina í Hanstholm

Vit sóknast eftir einum starvsfólki til nýggju ferðafólkadeild okkara í Hanstholm at taka sær av sølu og bílegging.

*Arbeiðsuppgávur*
Tínar arbeiðsuppgávur verða søla og bílegging av ferðaseðlum og frítíðaruppihaldi í Føroyum, Íslandi og Hetlandi.
Í tøttum samstarvi við okkara ferðamál skalt tú byggja tær neyðugar royndir at leggja til rættis og fremja áhugamál kundans.

Harafturat verður tú við í eini raðskipan til innskriving av ferðafólki í sambandi við fráferðirnar leygardagar.

*Førleiki*
Tú mást vera fryntlig/ur og fyrikomandi og duga at tosa í telefon.
Tú ert útbúgvin innan ferðavinnu, ella hevur fleiri ára royndir innan sølu í ferðavinnuni.
Tær dámar at vera partur av einum ungum bólki, sum byggir upp deildina.
Tú tosar/ skrivar enskt, er smidlig/ur og missir ikki pippið, tá hart leikar á.
Tilknýti til Føroyar/ Ísland og royndir við heimasíðu smíð eru fyrimunir, men als ongin treyt.

*Løn og setanarviðurskifti:*
Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, við atliti til royndir og útbúgving.
Starvið verður sett 1. mars 2002 ella áðrenn.

Spurningar:
Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Aage Bruun,
tel +45 96 550 553 ella
Solvej Boltz, tel +45 96 550 562.

Umsókn:
Skrivlig umsókn við CV verður at senda til Aage Bruun, stjóra í seinasta lagi 20. januar 2002.

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, sigLt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat eitt hotell, eitt vallaraheim

SMYRIL LINE DANMARK
7730 Hanstholm · Danmark
Tel +45 96 550 500 · Fax +45 96 550 561
office@smyril-line.dk · www.smyril-line.dk